TING-HELLAN

# Ferðabræv úr Íslandi



Kjartan Kristiansen

Afturkomin av aðru ferð til Íslands eftir tveimum mánaðum ert tú líka býttur sum øll hini, sum spyrja, hvat er tað, sum Íslendingar duga betur enn onnur. Alt gongur við rúkandi ferð. Trúgvin um framtíðina og um at eiga lut í henni sæst alla staðir, og tú gloppar ikki eina avís uttan at lesa, at nú hava íslendingar aftur keypt eina fyritøku í útlondum.

Men nú frættist so, at útlendskur peningur hevur ilt við at leita til Íslands. Íslendingar fýlast á, at teirra heimliga vinnulív ikki hevur fingið tann heilsugevandi íblástur av altjóðagerð, kunnleika og váðafúsum kapitali, sum stendst av útlendskum íløgum, og sum tykist so avgerandi neyðug í mentu búskapunum í øllum londum. Útlendingar keypa ikki íslendsk partabrøv á keypsskálanum í Íslandi, og fleiri íslendsk partafeløg verða skrásett á keypsskálum uttanlands. Men hesi feløg hava meginvirksemið uttanlands og ikki í Íslandi, har nýggju og nýskapandi fyritøkurnar hava ilt við at fáa kapital og fígging.

Róð verður tí fram undir, at neyðugt er at loyva útlendskum kapitali inn í fiskivinnuna og í orkuveitingarkervið, men harumframt verður bent á, at neyðugt er at einfaldgera og lætta um regluverk, skattir og avgjøld.

## Einskiljing og útlendskar íløgur

Heldur ikki vit kunnu reypa av stórum íløgum úr útlondum. Íslendingar og norðmenn hava gjørt tær flestu, og tað tykist sum íslendskar fyritøkur, sum ætla sær út í heim, gera fyrstu royndirnar í Føroyum.

Stóru møguleikarnir hava kanska ikki verið, uttan í alivinnuni og teimum fáu føroysku privatu fyritøkunum, sum eru: Skipafelagið Føroyar, Tórshavnar Skipasmiðja og SMS, men royndir hava verið eftir øðrum, eitt nú Havsbrún, sum føroyskir íleggjarar hava sæð størra ágóðan í at eiga sjálvir.

Útlendskur kapitalur leitaði ikki til Íslands at keypa upp, tá stóru einskiljingarnar fóru fram har. Sluppu kanska heldur ikki uppí part, og tað vóru tí íslendingar, sum keyptu og sum nú eiga vinnulívið í Íslandi. Men so hvørt, sum partar av tí gerast altjóða kappingarførir og skrásettir á stóru keypsskálunum, verða útlendingar áhugaðir í teimum.

## Atlantsflog

Eftir íslendsku royndunum bendir sostatt lítið á, at útlendskur kapitalur fer at standa í fremstu røð at keypa føroysku fyritøkurnar, tá - og um tær fara at verða einskildar. Heldur ikki íslendskur kapitalur; hann hevur longu gjørt sær sínar royndir her og hevur fingið hægri flog.

Hví skuldi hann t.d. keypt Atlantsflog, tá hann longu situr við Sterling Airways, Maersk Air og triðinginum av svenska Flyme? Hann keypti ikki flogførini frá Maersk, og hann mann ikki hava áhuga í flogførunum hjá Atlantsflogi. Søluvirðið av Atlantsflogi liggur í ferðafólkaflutningi til og úr Føroyum og í teimum eykaflutningsmøguleikum, sum tað hevur megnað at fingið.

Higartil er felagið sloppið undan óhappum, og fram til í ar hevur tað havt ein óvanliga góðan regularitet. Men felagið er ongin fongur hjá altjóða íleggjara ella flogfelagi, sum kappast í lágprísi ella um stórleika. Felagið er ser-tænastufelag burturav.

Tað verða tí føroyingar, sum fara at bjóða besta prísin fyri felagið; teir kenna marknaðin, og teir kenna føroyska samfelagið og politisku skipanina.

## Møgulig leið

Vit kunnu hinvegin spyrja, hvat hevði gjørt Atlantsflog áhugavert hjá útlendskum og har við eisini føroyskum íleggjarum, sum vilja gera felagið altjóða kappingarført á einari enn óroyndari rók (niche) og tí til eina góða íløgu.

Fyrsta treytin, fyri at hetta kann henda, er, at føroyska regluverkið verður á fremsta altjóða støði, og at ongar sertreytir eru fyri at reka flogferðslu úr Føroyum.

Onnur treytin er, at øll gjøld verða avtikin, og flogvøllurin verður opin alt samdøgrið. Tænastutilboðini á flogvøllinum mugu útbyggjast og virka á hægsta góðskustigi, ikki minst til smáflogfør, serliga charterflúgving og tyrlu-flúgving.

Slíkar veitingar høvdu styrkt og tryggjað Atlantsflog sum føroyskt flogfelag burtur av, uttan mun til, um føroyingar ella útlendingar áttu tað. Samstundis hevði tað fingið onnur flogfeløg at "búsetst" í Føroyum. Slíkar veitingar høvdu gjørt kappingina



um at keypa Atlantsflog veruliga og prísin hægri.

Spurningurin er tó ikki, hvør prísur fæst fyri Atlantsflog. Í verandi støðu fæst ikki nógv fyri felagið.

Tað felagnum fyrst og fremst tørvar, er meira kapital og styrktan vinnuligan leiðslubygnað. Tá er tað ført fyri at kappast á øðrum inntøkugevandi marknaðum, at tola andróður og at royna nýggjar leiðir.

Tí ræður um nú at bjóða privatum íleggjarum at seta pening í felagið og styrkja tað vinnu-liga og leiðsluliga, so partapeningurin hjá landinum kann seljast fyri ein góðan prís.

Verður hetta ikki gjørt, ella verður felagið verandi á almennum hondum, hava vit sjálvi forkomið felagnum og tryggari flogferðslu til og úr Føroyum.

## Føroya Tele

Nú Vodafone Iceland hevur sett seg á ræðis-rættin á Kalli, munu eitt nú íslending-ar ikki eisini fara at keypa Føroya Tele, tá tað einaferð kemur so langt, at partabrøvini her fara at verða seld? Kann tað hugsast, at fult einskildi Síminn fer at vilja keypa Føroya Tele? Trúliga fer hvørki av feløgunum at vísa Føroya Tele stórvegis ans. Tað hanga so nógvir lepar við Føroya Tele, sum darva altjóða virkseminum hjá Vodafone, at hetta felag fer ikki at royna at eiga føroyska telemarknaðin burturav, og Síminn fer heldur ikki at brúka orku at kappast í Føroyum við Vodafone Iceland. Kappingin teirra millum er nóg hørð í Íslandi. Áðrenn Føroya Tele er komið til sølu, eru íslendsku feløgini farin á størri og meira lovandi marknaðir.

Einasti útlendski keyparin, ið kann hugsast skuldi verið TDC (Tele Danmark) - um bert av veneratión. Men eigararnir av hesum felag fara ikki at loypa á leistum at taka ábyrgdina av føroyska televerkinum.

So eisini her verða tað føroyskir íleggjarar, sum fara at keypa. Her forðar onki at selja. Tí eigur hetta felag at verða tað fyrsta at bjóða út til sølu.

## Føroya Banki

Heldur ikki við einskiljing av Føroya Banka fara vit at fáa tað stóra rendið av útlendskum íleggjarum hendan vegin. Teir,